Ár 2010, hin 23. februar

**10.**
**09/00315 Bygging av ellis- og røktarheimi í miðbýnum – víðari gongd í málinum, val av bygginevnd, byggibúning o.a.**

Vísandi til fyrra skrivið til nevndirnar, dagf. 11. jan. 2010, verður upplýst, at býráðið og borgarstjórin sambært galdandi reglugerðum: "Mannagongd fyri kommunalar verkætlanir" og "Reglugerðir fyri bygginevndir" hava valt kommunalu umboðini í nevndina, sum skal fyrireika byggingina av røktarheiminum. Umboðini í nevndini eru hesi:

· Elsebeth G. Hansen, forkvinna í Sosialu Nevnd, umboðandi meirilutan,

· Jákup N. Mikkelsen, býráðslimur, umboðandi minnilutan,

· Jancy B. Klein, sosialdeildarleiðari, umboðandi Trivnaðar-fyrisitingina,

· Henry Mellemgaard, roknskaparleiðari, umboðandi Miðfyri-sitingina,

· Hans Fróði Hansen, byggifrøðingur, umboðandi Teknisku Umsiting, og

· Elsba Lützen, økisleiðari hjá Nærverki í Norðoyggjum, umboðandi AMR. Hetta sambært fráboðan frá AMR

Borgarstjórin hevur somuleiðis tikið ta avgerð, at Jancy B. Klein verður forkvinna í nevndini. Sí skriv og frágreiðing frá umsitingini, dagf. 11.01.2010. Mælt verður til, at umsitingin, bygginevndin og byggiharrin fáa heimild til at arbeiða víðari við málinum og herundir eisini at framskunda eitt møguligt útfyllingararbeiði við gróttøku úr miðbýnum, vísandi til viðløgdu skitsu. Mælt verður eisini til, at nevndir og býráð siga sína hugsan viðvíkjandi spurninginum, um møgulig lokal atlit skulu takast.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 11.01.10, og mælir, at lokal atlit verða tikin fyri borgarans besta.

Sosiala Nevnd tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 11.01.10.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 09.02.10 og Sosialu nevnd 10.02.10.

**Býráðsins samtykt:** Broytingaruppskot frá ASJ, um at taka undir við tilmælinum, og at bjóða arbeiðini út lokalt í kommununi, fall við 3 atkv. fyri (ASJ, EGH og J. Skoradal) og 7 atkv ímóti.

Broytingaruppskot frá SOJ, um at taka undir við tilmælinum, og at lokal atlit verða tikin í sambandi við útbjóðingina, varð samtykt við 8 atkvøðum fyri 2 atkvøðum ímóti (ASJ og J. Skoradal.

**11.**
**08/00033 Spinnaríið – seta pening í grunn.**

Sí uppskot frá Jógvan Skorheim, dagfest 27.01.2010.

Mentanarnevndin mælir til, at í sambandi við endurskoðan av fíggjarætlanini verður neyðugur peningur at seta í grunn til verk-ætlanina: Spinnaríið.

Ein meiriluti í Fíggjarnevndini, Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim og Auðunn Konráðsson, tekur undir við Mentanarnevndini.

Ein minniluti í nevndin, Steinbjørn O. Jacobsen, mælir til, at málið verður tikið upp í samband við endurskoðan av fíggjarætlanini 2010.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið frá Mentanarnevndini og meirilutanum í Fíggjarnevndini samtykt við 7 atkv. fyri og 3 ímóti (SOJ, EyS og J. Skoradal).

**12.**
**09/00777 Áheitan um at seta fleiri fólk í starv á Barnavernd-artænastuni.**

Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagf. 08.01.2010. Sosiala Nevnd tók undir við tilmælinum og samtykti, at peningur til fleiri starvsfólk skuldi takast av rentuavlopinum. Fíggjarnevndin og Býráðið tóku undir við Sosialu Nevnd. Av tí at her formliga er talan um eina eykajáttan, skal málið samtykkjast 2 ferðir.

Vísandi til skriv frá umsitingini, dagf. 04.02.2010, samtykti Sosiala Nevnd at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 02.11.2009.

Fíggjarnevndin tekur undir við samtyktini hjá býráðnum 26.01.2010 og Sosialu nevnd 10.02.2010.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**13.**
**2007-19-103 Møgulig kommunusamanlegging – samráðingar**

Eftir innleiðandi samskifti millum borgarstjórararn báðar, hevur Kristian Hansen, borgarstjóri í Húsa Kommunu, boðað frá, at kommunan er áhugað í einari samráðingartilgongd um samanlegging.

Fíggjarnevndin beinir málið í býráðið til umrøðu.

**Býráðsins samtykt:** Eftir umrøðu av málinum varð samtykt, at býráðið er positivt yvir fyri málinum, og at ein samráðingarbólkur verður valdur, tá ið ein støðulýsing fyriliggur.

**14.**
**10/00122 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar – dagføring 2010.**

Sí dagførda reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar.

Fíggjarnevndin tekur undir við dagførdu reglugerðini, dagfest 25.01.2010.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**15.**
**09/00286 Gjald fyri brúksvatn.**

Í samtyktu fíggjarætlanunum fyri 2009 og 2010 verður roknað við íalt kr. 300.000 í inntøkum um árið fyri vatngjøld frá vinnufyritøkum í kommununi. Somuleiðis hevur býráðið á fundi 29.04.09 – eftir tilmæli frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini – samtykt eina staðfesting og útgreining av, hvussu hesi gjøld skulu innkrevjast. Undir viðgerðini og fyrireikingini av málinum varð gingið útfrá, at samtyktin skuldi setast í verk frá og við 4. ársfjórðingi 2009. Sí skriv frá borgarstjóranum, dagf. 29.01.10. Vegna býráðsmeirilutan verður mælt viðkomandi nevndum og býráðnum til at samtykkja, at nevndu býráðssamtyktir, um at áleggja vinnufyritøkum brúksgjald fyri vatn, verða strikaðar. Upplýst verður, at sambært fyribils roknskapartølum megnaði Vatndeildin fyri árið 2009 at halda seg innan fyri verandi játtan hóast hesar minni inntøkur.

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá borgarstjóranum, dagfest 29.01.2010.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli, dagfest 29.01.2010, um avtøku av vatngjaldinum.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini 09.02.10 og Teknisku Nevnd 09.02.10.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt við 9 atkvøðum fyri og 1 ímóti (EyS).

**16.**
**2007-09-035 Spillvatnsætlan.**

Innlendismálaráðið hevur 27.04.09 sett í gildi kunngerð, sum áleggur kommununi at gera eina nøktandi spillivatnsætlan innan árslok 2010. Hetta er umfatandi og krevjandi arbeiði, sum tí má byrjast skjótast tilber. Áður mettur kostnaður av at gera spillvatnsætlanina var kr. 400 til 500 túsund. Tað er tó trupult at meta um kostnaðin, av tí at umsitingin ikki kennir støðuna til fulnar. Sí skriv og uppskot til fígging frá T.U., har mælt verður til at játta neyðuga peningin við at flyta 300 tkr. frá rentuútr. til Kloakkir. Av tí at her formliga er talan um eina meirjáttan, krevur málið 2 viðgerðir í býráðnum.

Heilsu- og Umhvørvisnevndin tekur undir við tilmælinum, 05.02.10.

Tekniska Nevnd viðgjørdi tilmæli frá T.U., dagfest 05.02.10. Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin tekur undir við Heilsu- og Umhvørvisnevndini 08.02.10 og Teknisku Nevnd 09.02.10.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**17.**
**2007-10-025 Bátahylur í Árnafirði**

Í 2008 var komið væl áleiðis at fyrireika ábøtur og betringar av bátahylinum í Árnafirði, men fíggjarliga støðan steðgaði víðari gongd í málinum. Nú eru ynski frammi um at at taka táttin uppaftur við at leggja alduverju framman fyri innsiglingina og at gera framvið,

so at bátar fáa lagt at. Sí skriv frá T.U., dagfest 05.02.2010, har mælt verður Havnanevndini til at seta av 1,2 mkr. til fyrireiking og byrjan av arbeiðnum.

Á fundi tann 09.10.2009 og 09.02.2010 mælir Havnanevndin til at kanna kostnað av bylgjubrótara og kajsíðu, og at møguligur avlopspeningur verður brúktur til aðrar ábøtur so sum el og annað.

Vísandi til tilmæli frá Havnanevndini um kostnaðarmeting, boðar T.U. í ískoytandi notati frá T.U., dagfest 15.02.2010, frá nýggjari kostnaðarmeting av arbeiðnum, og har greitt verður frá, at ætlanin hjá Havnanevndini er at fíggja arbeiðið av øktu játtanini hjá Klaksvíkar Havn í 2010.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini 09.02.2010.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**18.**
**10/00139 Frítíðardepilin Vágin – uppskot um fríðkan av grótkastinum á Vánni.**

Í skrivum tann 03.02.2010 vísa býráðslimirnir Óli M. Lassen, Elsebeth G. Hansen og Jógvan Skorheim á, at tørvur er á at skipa og fríðka grótkastið í miðbýnum, og skjóta tey upp eina verkætlan í 3 stigum, harav tann fyrsta av teimum verður kostnaðarmett til kr. 200.000,-

Málið hevur verið til kunningar í Byggi- og Býarskipanarnevndini 08.02.10 og Mentanarnevndini 10.02.10.
Tekniska Nevnd tekur undir við verkætlanini, dagfest 03.02.10.
Fíggjarnevndin tekur undir við TN 09.02.10, har talan er um fyrsta part av verkætlanini, sum verður at fíggja innan fíggjarkarmin hjá TN.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið frá Fíggjarnevndini samtykt.